Ingi Olsen var flúgvandi, tá VÍF og KIF hittust mikukvøldið

Savnsmynd

Stórsigur til VÍF

Vestmenningar vundu burtur úr kollfirðingum, tá grannauppgerð var mikukvøldið

JÁKUP MØRK

VÍF-KÍF 29-15 (12-8)

Ofta verður tikið til, at í grannauppgerðum kann alt henda, men kortini mundu tey fægstu rokna við, at KÍF fór at gera nakað sum helst við FM-vónirnar hjá VÍF.

Alt árið hava liðini verið í hvør sínum enda, og tískil var væntandi, at talan fór at verða um ein greiðan sigur til vestmenningar.

Løgdu nógv fyri

Tað varð eisini skjótt greitt, at vestmenningar ikki ætlaðu, at hetta skuldi verða ein av teimum døgunum, har botnliðini sleppa at spæla oddaliðunum eitt puss.

Frá fyrsta bríkslið varð full ferð sett á, og kollfirðingar vóru neyvan vaknaðir, áðrenn vestmenningar høvdu lagt seg á odda við einum tenniseggi.

Eftir hetta megnaðu gestirnir tó at stríða seg nakað upp móti VÍF, men hetta komst helst eisini av, at teir á heimaliðnum nú høvdu sett ferðina nakað niður.

Seinni hálvleikur byrjaði á sama hátt sum fyrri, men eftir einar tíggju minuttir, slakað vestmenningar aftur á. Tað er jú aloftast soleiðis, at tað er torført at halda ferðini uppi, tá eitt lið hevur vunnið sær stóra leiðslu, og soleiðis varð eisini hesu ferð.

Ikki tí, málúrtøkan kann vísa seg at verða avgerandi fyri, hvar FM-heitið skal enda í ár, men hesum viðvíkjandi eru tað vestmenningar, sum standa seg nógv best, og tískil høvdu teir kanska ikki fyri neyðini at vinna við so øgiliga nógvum málum.

Ingi í essinum

Fyri vestmenningar man tað vera sera hugaligt, at Ingi Olsen nú tykist at vera komin rættuliga í gongd. Ikki tí, hann hevur verið teimum ein hollur stuðul alt árið, men talan hevur kortini ikki verið um sama stórspæl, sum hann hevur sýnt so ofta fyrr.

Úr Vestmanna frættist, at hann kollfirðingarnir als einki fingu gjørt fyri at steðga honum, soleiðis at hann skoraði nærum eftir vild.

Hinvegin hevði Sámal Joensen ikki ein av sínum bestu døgum, men kanska verður tað øðrvísi, tá onkur annar málverji stendur í málinum. Óla Kristian hevði nevnliga enn einaferð ein góðan dyst, og serliga vóru tað skotini frá Sámali, sum hann hevði hug at taka.

Um venjarin hjá VÍF, Hjalmar Klein Olsen, fær teir báðar, Inga og Sámal, at spæla upp til sítt besta í sama dysti, er ilt at síggja, hvussu mótstøðuliðini skulu steðga teimum, men hinvegin kann FM stríðið gerast sera tungt, um lagið á teimum ikki er hitt rætta.

Dysturin í tølum
Málskjúttar:
VÍF: Ingi Olsen 13 (3), Agnar Joensen 7 (1), Martin Hummeland 5, Sámal Joensen 1, Rógvi Nielsen 1, Sjúrður Holm 1, Johny Joensen 1
KÍF: Eddie Joensen 5 (1), Jákup Dam 2, Per Joensen 2, Vagnur Johannesen 2, Petur M. Poulsen 2 (1), Emil Petersen 1, Jónálvur Johannesen 1
Brotskøst:
VÍF 4, KÍF 4
Útvísingar:
VÍF 1, KÍF 3
Dómarar úr Kyndli:
Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

Neistin á silvurkós

Í einum sera jøvnum dysti, eydnaðist tað Neistanum fyri triðju ferð á rað at knógva besta kvinnuliðnum hjá Kyndli, men sigurin var úrslit av stíðsvilja, heldur enn góðum spæli

JÁKUP MØRK

Kyndil-Neistin 16-17 (9-8)

Hóast tað enn eru nakrir dystir eftir at leika í bestu kvinnudeildini, so er spenningurin um komandi føroyameistaran tó langt síðani fokin.

Dysturin um hini bæði heiðursmerkjaplássini er tó framvegis púra opin, tí undan dystinum var greitt, at ein møguligur vinnari av hesi lokaluppgerð, kom ájavnt VÍF í stigum.

Tískil var kanska væntandi, at talan fór at verða um ein dyst, sum bæði liðini ætlaðu sær at vinna, men hóast hetta vóru ikki nógv fólk at síggja í Ítróttarhøllini á Hálsi, tá dysturin varð settur í gongd.

Lítil ferð

Um hetta ávirkaði hugburðin hjá leikarunum, skal eg lata verða ósagt, men í øllum var ferðin á spælinum ikki nakað serlig fyrstu minuttirnar.

Venjararnir báðir mundu heldur ikki verða heilt nøgdir við avrikini hjá sínum leikarum, tí longu eftir átta minuttum, nýtti kyndilsvenjarin sítt time-out.

Neistin hevði tá vunnið sær eina 3-1 leiðslu, men eftir at Sophus hevði sagt nøkur borgarlig orð við leikarar sínar, var skjótt, at Kyndil hevði vunnið seg fram um mótstøðuliðið.

Neistavenjarin nýtti stutt eftir sítt time-out, og eftir hetta broyttist spæliætlanin nakað, soleiðis at Lotte Sørensen nú varð mansvard.

Hetta tóktist eisini at darva kyndilsspælinum almikið. Ferðin á spælinum varð aftur sett niður, og tískil hevði neistaverjan ikki stórvegis trupulleikar av at steðga kyndilsálopunum.

Í hinum endanum lá tó heldur ikki so væl fyri hjá Neistanum, har stórur saknur var í leikbannaðu Ileana Manolescu, tí nú var eingin leikari, sum einsamøll megnaði at bróta ígjøgnum kyndilsverjuna.

Størsta skothóttanin var, sum ikki einaferð, Inga Danberg, men tá viðspælararnir ikki skapa henni nóg mikið av plássi, gerst ofta trupult at koma í nóg góða skotstøðu, og tískil vóru fleiri skotroyndir heldur óneyvar.

Hóast tað helst vóru neistakvinnurnar, sum høvdu leikliga yvirvág, og í øllum førum stríddust meira, so megnaðu tær ongantíð at skræða seg leysar frá Kyndilsliðnum, og tá farið varð til hálvleiks, hevði Kyndil aftur vunnið seg eitt mál fram um.

Gongdin í seinna hálvleiki var á leið hin sama, sum hon hevði verið í fyrra. Neistin vann seg tó fram um Kyndil, tá hálvleikurin var mest sum hálvrunnin, men munurin gjørdist kortini ongantíð hin stóri.

Ikki tí, tvær ferðir høvdu tær møguleika at skapa eitt hol, tá tær høvdu ein leikara í yvirtal, men tær megnaðu ongantíð at gera sær dælt av hesum, og ístaðin varð tað Kyndil, sum kundi stríða seg upp á javnleik, tá tríggir minuttir restaðu at leika.

Tað kom tó bert tað eina málið afturat í dystinum, og hetta átti Neistin, og kundu leikararnir sostatt fegnast um, at tað triðju ferð á rað hevði eydnast teimum at bast yngra grannafelagnum.

Neistin eftir silvurinum

Leikliga sæð gjørdist dysturin mikukvøldið ongantíð tað stóra upplivilsi. Ferð kom ongantíð á dystin, og teknisku villurnar, sum vórðu framdar, kunnu neyvvan teljast á einari hond.

Munurin á liðnum var snøgt sagt tann, at Neistakvinnurnar høvdu nógv størri vilja at vinna dystin.

Kyndilsliðið tykist vera fullkomuliga steðga upp, eftir at tað leygardagin gjørdist greitt, at eingi gullmerki vera at fáa í ár, og harumframt eru tær kanska eisini nøgdar, við tað at tær longu hava vunnið steypakappingina.

Fyri tað fyrr so sigursvanda neistaliðið hava silvurmerkini kanska ikki so stóran týdning, men kortini stríddust leikararnir fyri sigrinum í samfullar 60 minuttir.

Tað eydnaðist teimum eisini at fáa stigini til høldar, men enn er vegurin til silvurmerkini langur. Kravið má í øllum førum verða, at tær fáa stig burtur úr seinasta dystinum, tá tær á útivølli skulu hitta VÍF.

Við tapinum misti Kyndil hinvegin eitt týðandi fet í silvurstríðnum, men skal metast eftir avrikinum mikukvøldið, munnu tær ikki leggja tað stóra í hetta.

Fair-Play takk

At enda ein lítil áminning til einstakar av kyndilsleikarunum.

Eg havi skriva tað fyrr, og tað ætli eg mær eisini at gera framyvir, at tað líkist ongum, tá leikarar ikki vilja takka hvørjum øðrum eftir loknan dyst.

Tað er jú vanliga soleiðis, at allir leikarar á báðum liðum hittast á miðjum vølli, eftir at dysturin er lokin, men hesu ferð hildu Rakul og Ann ikki, at hetta fór at loysa seg.

Hóast tað mangan er heldur baldrut á vøllinum, so eigur slíkur siður eftir mínum tykki at verða varveittur, soleiðis at leikarar og áskoðarar framhaldandi hava virðing fyri ítróttini.

Dysturin í tølum
Málskjúttar:
Kyndil:
Jórun Ludvig 6, Ann Hansen 4, Lotte Sørensen 4 (2), Palma Petersen 1, Rakul Joensen 1
Neistin: Inga Danberg 4, Mildrið Jacobsen 4, Marjun Jógvansdóttir 3 (2), Katrin á Neystabø 3, Rúna Wardum 2, Bjørg Partursson 1
Brotskøst:
Kyndil 4, Neistin 3
Útvísingar:
Kyndil 2
Dómarar út Tjaldur:
Kári Hansen og Dánjal Hansen

Rúna Wardum tyksit nú at vera komin rættuliga fyri seg, eftir at hon undan kappingarárinum meiddi sær økslina

Mynd: Álvur Haraldsen

Nú byrjar toppurin at mynda seg

Eftir dystirnar mikukvøldi›, hava oddali›ini í bólkunum, A og B, styrkt um oddastø›u sína, men enn er tó ikki avgjørt, hvørji av li›unum skulu vinna sær pláss í fjór›ingsfinalunum, hóast tey bæ›i fremstu li›ini í bólkunum nú hava sera gó›ar møguleikar at koma ví›ari



Patrick Kluivert og Rivaldu fegnast eftir at hin seinni nevndi hevur skoti› seinasta máli› í 4 - 2 sigrinum á Porto

JÁKUP MØRK

F‡ra dystir í seinna bólkaspælinum vór›u leiktir mikukvøldi›, og uttan at nøkur sensatión daga›i undan, styrktu favorittarnir um oddastø›u sína. Serliga í bólki A, tykist ta› nú greitt, hvørji li› koma ví›ari, me›an Valencia enn hevur møguleika at gera naka› vi› Fiorentina og Manchester United.

Bólkur A:

Rivaldo vann á Jardel

Tá Barcelona á heimavølli tók ímóti Porto,Var ta› fyrst og fremst heimsins besti fótbóltsleikari, Rivaldo, sum var munurin á li›unum bá›um.

Ikki tí, ein annar brasiliuma›ur, Jardel, leg›i naka› óvænta› gestirnar fram um, men eftir stuttari løtu, hev›i Rivaldo javna› stø›una, tá hann vi› einum beinlei›is frísparki› sendi bóltin í máli›.

Spanska meistarali›i› vann seg upp á 2-1, tá Figo sendi eitt hornaspark inn fyri máli›, har Frank de Boer var hægstur og stúta›i bóltin í máli›.

Beint fyri hálvleik kundi ein annar hollendingur, Patrick Kluivert, økjatil 3-1, tá hann sera hegnisliga fekk tamarhald á einum innleggi úr høgru, á›renn hann dróg fram vi› verjuleikara og sendi bóltin í máli.

Í seinna hálvleiki leg›i Porto eitt stórt tyst á mótstø›uli›i›, og tígjgu minuttir fyri leiklok, fekk Jardel sítt næsta mál, solei›is at spenningur aftur kom í dystin.

Hesin helt seg fram til 89. minutt, tá Rivaldo enn einafer› fekk alt Camp Nou at dansa, tá hann fór sjálvur fram vi› verjuni, finta›i málverjan og leg›i bóltin í tóma neti›.

Tey bæ›i stórli›ini av Iberisku hálvoynni hava tó framhaldandi sera gó›ar møguleikar fyri at røkka fjór›ingsfinalunum, tí hin dysturin í bólkinum laga›i seg solei›is, at Hertha Berlin og Sparta Prag b‡ttu stigini í millum sín.

Ta› var annars heimali›i›, sum leg›i seg á odda, tá mi›vallarin, Sixten Veit, úr stuttari fjarstø›u sendi eitt skot í neti›. Ta›, sum eftir var av dystinum, var líkt til, at t‡skararnir høvdu tamarhald á stø›uni, men brádliga hendi ta›, sum avgjørt ikki mátti henda.

Mi›vallarin Dariusz Wosz for fullkomuliga skeivur av einum bólti, og Horst Siegl fekk fat-ur á bóltinum. Hann setti beina kós móti málinum, og ta› eydna›ist honum eisini at skora›, hóast verjuleikari hjá t‡ska li›num nær um megna›i at verja fyri í evstu løtu.

Barcelona er nú á odda í bólkinum vi› sjey stigum, Porto hevur seks stig, me›an Hertha Berlin og Sparta Prag hava ávíkavist tvey og eitt stig.

Gó› líkindini eru tí fyri, at ta› ver›a Barcelona og Porto, sum leika fjór›ingsfinalurnar, men Hertha Berlin kann framvegis gera um seg, men so skulu úrslitini laga seg sera væl.

Bólkur B

Giggs bjarga›i Manchester
Manchester United vann sær tey tr‡ vænta›u stigini, tá teir á heimavølli vunnu 2-0 á franska Bordeaux. Sigurin var tó langt í frá so tryggum, sum tølini vísa, tí europeisku meistararnir s‡ndu als ikki naka› meistaraspæl hetta kvøldi›.

Álopsspæli› tóktist sera trekt, og ver›ur sæ› burtur frá eini vandamiklari frísparksroynd frá David Beckham, so gekk long tí›, á›renn heimali›i› hev›i nakra veruliga roynd móti málinum.

Móti endanum av fyrra hálvleiki eydna›ist ta› tó Ryan Giggs at leggja heimali›i› fram um, tá Beckham sendi eitt av sínum væl kendu innleggum beint fyri føtur hansara.

Stutt eftir hetta, kundi Nicky Butt økt um lei›sluna, men hann brendi upplagda møguleikan, hann fekk, tá Giggs breyt ígjøgnum í vinstru.

Í seinna hálvleiki mundu ásko›ararnir hjá heimali›num sett hjarta› í hálsin, tá fransmenninir tvær fer›i innan stutta tí›, gjørdust púra leysir í brotsteiginum. Lukkutí› megna›i Herve Alicarte ikki at umseta risamøguleikarnar til mál, og í sta›in kundi Teddy Sheringham økja til 2-0, tá Giggs enn eina fer› dróg ígjøgnum í vinstra bor›i.

Walisiski úrmælingurin tykist nú rættuliga at hava funni› stevi› aftur, eftir at fyrr í ár hevur skaddur í drúgva tí›. Móti Bordeaux var hann nógv besti leikari á vøllinum, men um restin av li›num ikki fær spæli› at rigga betur, er líti›, sum bendir á eina endurtøku av finalusigrinum undanfarnu kapping.

Fyrstu fer› at fótbóltsásko›arar veruliga bitu merki í navni›, Predrag Mijatovic, var tá hann fyrst í nítiárunum skeyt eina rúgvu av málum fyri spanka Valencia. Sí›ani er hann umvegis Real Madrid komin til Firenze, og mikukvøldi› skuldi hann royna seg móti fyrrverandi li›feløgum sínum úr Valencia.

Hann var› eisini ma›urin, sum um mi›an fyrra hálvleik skeyt einasta máli› í dystinum, og sum samstundis tryggja›i, Fiorentina framhaldandi er á odda í bólkinum.

Máli› skeyt hann vi› brotssparki, eftir at hann sjálvur var› feldur í spanska brotsteiginum. Løtu seinni kundi Rui Costa økt um lei›sluna, men skot hansara fór beint vi› sí›una av spanska málinum.

Ísta›in var› ta› nú Valencia, sum leg›i eitt stórt tr‡st á italsku verjuna. Italski venjarin, Giovanni Trappatoni, er tó kendur fyri, at li› hansara eru stinn í verjupartinum, og solei›is var› eisini hesu fer›. Fyrst og fremst orsaka› av stórspæli frá Fransesco Toldo, megna›u teir at halda fast um lei›sluna, og mi›skei›is í seinna hálvleiki kundi Batistuta sløkt sponsku vónirnar, men úr fríari skotstø›u sendi hann bóltin beint á spanska landsli›smálverjan, Canizares,

Vi› sigrinum helt Fiorentina fast um oddastø›u sína, og hava teir nú sjey stig. Manchester United hevur seks stig á ø›rum plássi, me›an Valencia hevur tr‡ stig. Ni›ast liggur Bordeaux, sum bert hevur eitt stig, og tískil lítlan og ongan møguleika at vinna sær sæti í fjór›ingsfinalunum.



Ryan Giggs var klárt besti ma›ur á vøllinum tá enska felag hansara vann 2 - 0 á Bordeaux mikukvøldi›

Støðan 1. deild kvinnur

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1	Stjørnan	7	7 - 0 - 0	493	383	110	23
2	VÍF	6	4 - 0 - 2	398	356	42	15
3	Neistin	7	5 - 0 - 2	363	359	4	15
4	Kyndil	7	3 - 0 - 4	398	359	39	13
5	VB	7	1 - 0 - 6	424	452	-28	6
6	Tjaldur	6	0 - 0 - 6	285	452	-167	0

StÍF hevur tikið liðið úr kappingini

Støðan 1. deild menn

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1	VÍF	9	7 - 0 - 2	610	472	138	25
2	Neistin	7	7 - 0 - 0	558	473	85	23
3	StÍF	7	5 - 0 - 2	548	472	76	21
4	Kyndil	8	5 - 0 - 3	562	489	73	17
5	KÍF	9	3 - 0 - 6	468	595	-127	7
6	H71	8	1 - 0 - 7	464	568	-104	4
7	Tjaldur	8	0 - 0 - 8	483	624	-141	3

Landsdystir

í millum Føroyar og Grønland fyri A-landsli›, menn

Í vikuskiftinum 3. - 5. mars, 2000 skipar HSF fyri landsdytum í hondbólti fyri A-landsli›, menn ímillum Føroyar og Grønland.

Fyrsti dysturin ver›ur í Høllini á Hálsi í Havn, fríggjakvøldi› 3. mars, klokkan 19.00.

Annar dysturin ver›ur eisini í Havn, leygardagin 4. mars klokkan 16.00.

Tri›i dysturin ver›ur í Høllini í Vestmanna, sunnudagin 5. mars klokkan 16.00.

Grønland hevur eitt hampuliga sterkt manslandsli›. Teir hava í fjør tiki› lut í panamerikansku kappingini fyri A-landsli›, har teir stó›u seg væl.

Fleiri av gønlendsku spælarunum spæla í donskum divisiónshonbólti og onkur í ligaini. Tveir av grønlendsku spælarunum spæla í T‡sklandi.

Á grønlendska li›num spæla hesir:

Niels Davidsen, málma›ur (ongan landsdyst)
Karl Davidsen, málma›ur (13 landsdystir)
Hans Alaufesen, (1 landsdyst)
David Fisker, (15 landsdystir)
Hans Knudsen, (15 landsdystir)
Rasmus Larsen, (15 landsdystir)
Hans peter Kyed Motzfeldt, (14 landsdystir)
Finn Nielsen, (15 landsdystir)
Carsten Olsen, (14 landsdystir)
Niels Poulsen, (ongan landsdyst)
Hans Peter Poulsen, (7 landsdystir)
Peter Sikemsen, (11 landsdystir)
Venjari hjá grønlendska landsli›num er Bo Roy og hjálparvenjari er Palle Jeramiassen.